Ferðavinnulógin

Vinnunevndin, 29. apríl 2024

Ferðavinnan

1. Ferðavinnan hevur sera ymiska ávirkan á ymisku økini í Føroyum.
2. Vit síggja longu ábendingar um“overtourism” í ávísum økjum í Føroyum. Vit síggja mótstøðu ímóti vinnuni og ímóti ferðafólki ítøkiliga. Í øðrum økjum er als eingin ferðavinna.
3. Lógin áleggur øllum somu regulering. Har mangla undantøk og serskipanir í uppskotinum.

Ferðavinnan

- Neyðugt við einari yvirskipaðari ferðavinnuætlan, sum stýrir ferðavinnuni. Fordeilir og um neyðugt avmarkar talið av ferðafólkum í ávísum økjum.
- Tað eigur ikki at verða VFI (sum í stóran mun er stýrt av stóri aktørinum í ferðavinnuni), sum avgerð hvussu stórur vøksturin í ferðafólkum skal verða.
- Neyðugt við sentralari hjálp til økini at skipa ferðavinnuna. Størsta avbjóðingarnar liggja oftast í fyrisitingarligum veikum økjum.

Politiska fyrireikingararbeiði

- Náttúruvernd er ikki ein kommunal uppgáva.
- Við uppskotinum verður tað kommunurnar, sum skulu loysa málið alt sum tað er.
- Men onki samskifti hevur verið við kommunur yvirhøvur, annað enn tvær stuttar framløgur um yvirskipaða leistin.
- Slíkt uppskot átti at verið viðgjørt í einum politiskum fylgibólki, við bæði borgarstjórum og løgtingslimum.
- Taka uppskotið aftur, seta viðkomandi aktørar saman fyri at tillaga uppskotið, so tað kann leggjast fyri aftur í heyst.

Berandi prinsippið í lógini:

Á síðu 7 niðast:

Í grannalondunum, sum Føroyar kappast við í ferðavinnuhøpi, er loyvt at veita ferðaleiðaratænastur uttangarðs uttan at rinda fyri atgongd. Tað tænir tí almennum vinnu - og ferðavinnu-áhugamálum, at hetta eisini er loyvt í Føroyum, so at ein og hvør, sum hevur hug og hegni, kann fara undir slíka vinnu.

Lógaruppskotið manglar serskipanir

- Uppskotið ger als onki við tær avbjóðingar, sum eru í mest útsettu økjunum.
- Uppskotið bannar flestu loysnum, sum higartil eru gjørdar í mest útsettu økjunum (frá 1. juni 2025).
- Hetta kann drepa lokalt initiativ og engagement.
- Sera trupult hjá kommunum at yvirtaka málið um ikki avbjóðingarnar í mest útsettu økjunum verða loystir við lógini.

Uppskotið fyriheldur seg ikki til avbjóðingarnar

Á síðu 14 stendur:

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Ferðafólk koma fyrst og fremst til Føroya at uppliva ta serstøku náttúruna kring alt landið. Fyri útjaðaraøki, har tað er trupult at fáa fólk at støðast, er ferðavinnan tí eitt gott høvi at fáa vinnuligt virksemi á staðnum. Samstundis kann ferðavinnan verða eitt gott ískoyti til landbúnaðin á staðnum, við tað at ferðavinna og landbúnaður eyðsæð kunnu fáa gagn hvør av øðrum. Í ferðavinnu starvast vanliga lutfalsliga nógvar kvinnur, og hetta kann vera ein fyrimunur, tá ið ræður um útjaðaramenning.

Fíggingin (§ 15)

- Landið hevur stórar inntøkur av ferðavinnu, meðan fleiri kommunur hava undirskot av ferðavinnuni.
- Fíggjarliga kostar uppskotið landinum onki, hinvegin fær landskassin eykainntøkur, tí cruise skip nú skulu rinda ferðagjald.
- Uppskotið áleggur ávísum kommunum lutfalsliga stórar íløgur og eisini umsiting.
- Uppskotið gevur kommunum umleið 15 mió. kr. árliga. So játtanin verður sera smábýtt. Meira fígging má fylgja við, í hvussu er at byrja við.

Fígging (§ 15)

- Ásett er, at 40% verður býtt javnt millum allar kommunur. Men onki stendur um hvussu. Er tað fólkatal?
- 60% eru eftir trýstinum frá ferðavinnu. Nevnt verður tal av telefonum. Men er tað mát fyri trýstið?
- Sera ógreitt, hvussu kommunan skal fordeila fjórðingin hjá jarðareigarum millum ymisku hagarnar (§ 15, stk. 1).
- Eisini løgið, at allar bygdir í kommununi við færri enn 300 íbúgvum skulu hava júst somu upphædd (§15, stk. 2). Tað kann jú vera sera ymiskt, hvønn tørv bygdirnar hava á fyriskipanum.